# Svii vann í Klaksvík

**Fýra telvarar kundu undan seinasta umfarinum vinna 2nd Klaksvík International. IM Johan Eriksson dró longsta stráið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í frálíkum umstøðum í Skálanum í Klaksvík, brynjaðu sekstan telvarar seg út í døgunum 7-11. oktobur. Fimm útlendskir tittultelvarar og fimm føroyingar mannaðu IM-bólkin, meðan seks ungir telvarar kappaðust í serligari unglingakapping. Makkaraparið Mogens Nielsen og Rani Nolsøe høvdu enn einaferð lagt lag á og skipað fyri.

### Góð einkultavrik - men óstøðugt

Teir fimm føroyingarnir, Flóvin Tór Næs, Martin Poulsen, Heini Olsen, Ólavur Simonsen og Hans Kristian Simonsen, vórðu allir ov óstøðugir, og blandaðu seg ongantíð av álvara í toppin. Tó kundi Hans Kristian í teoriini, við at vinna í seinasta umfarinum, blanda seg í medaljurekkirnar, men hann mátti lúta fyri dananum og altjóða meistaranum Klaus Berg.

Heini Olsen legði annars bestur út av føroyingunum, hevði tvey stig eftir trimum umførum, men steðgaði síðani tíverri upp og fekk eitt stig aftrat í seks teimum seinastu talvunum. Talvið hjá honum móti Ólavi er eitt dømi um hvussu gott Heini kann telva, tá hann er í rætta telvingarlagnum.

Ólavur og Flóvin høvdu truplar talvdagar í Klaksvík, hóast eisini teir høvdu nøkur góð einkultavrik. Serliga verður hugsað um sigurin hjá Flóvini yvir Klaus Berg. Báðir føroyingarnir endaðu á 9-10. plássi.



*Sviin Johan Eriksson vann altjóða talvkappingina í Klaksvík*

*Mynd: Solby Eliasen*

### Martin og Hans Kristian

Føroyameistarin Martin Poulsen fekk við einum stigi av fýra møguligum eina tunga kappingarbyrjan, men vendi síðani gongdina við framúr góðari telving og fekk saman við Hans Kristiani hálvtfimta stig, 50% skoru. Tvey góð avrik. Teir høvdu nakrar perlur til felags; sigrarnar hjá teimum á altjóða meistaranum Kim Pilgaard, eins og sigurin hjá Martini yvir Klaus Berg og sigurin hjá Hans Kristiani yvir stórmeistaranum úr Skottlandi Colin McNab.

Tveir lovandi telvarar, sum í løtuni tykjast at verða teir einastu sum kunna hótta John Arna Nilssen, sum nú hevur umleið 150 ratingstig fleiri enn næsti føroyingur á listanum! Eftir Klaksvík, hevur Martin yvirtikið plássið frá Flóvin sum næstovasti føroyingur.



*Rani Baldusson var tryggur vinnari í kappingini hjá unglingum*

*Mynd: Solby Eliasen*

### Útlendingarnir og toppurin

IM-norm kravið var seks stig av níggju møguligum, og hevði Hans K. vunnið seinasta talvið, varð hann bert hálvt stig frá málinum. Men so varð ikki, og endaði hann og Martin á einum deildum fimta plássi.

Vinnarin í fjør á Viðareiði Kim Pilgaard, hevði eina miseydnaða kapping við bert hálvum fjórða stigi og einum sjeynda plássi. Hví tað gekk so illa er ringt at siga. Hann hevur annars hildið sína rating støðugt omanfyri 2450 seinastu tvey árini, hevur enntá vunnið sær ein stórmeistaranorm. Men í Klaksvík telvaði hann sera óstøðugt.

Tríggir telvarar býttu annað plássið; Klaus Berg, Sævar Bjarnason og Colin McNab við seks stigum. Serliga yvirraskaði íslendski altjóða meistarin við fRískari, álopskendari og skjótari telving. Við sínum ratingtali 2284 í huga, er úrslitið hjá Sævari rættiliga flott. Klaus og McNab eiga at vera hampiliga nøgdir við síni avrik.

Johan Eriksson varð framanundan styrkismettur triðovastur. Eriksson tapti einans eitt talv, ímóti Sævari, og varð í roynd og veru tann mest støðugi av luttakarum og harvið rætti vinnarin. Við heim til Svøríkis fær hann 6.000 krónur í virðisløn.

### Rani Baldursson suverenur

Tað bleiv ongantíð tann stóri spenningurin millum unglingarnar. Klassamunur varð millum klaksvíkingin Rana Baldursson og hini í bólkinum. Tey seks leiktu dupultumfør, tíggju umfør tilsamans, og endaði Rani trygt fremstur við átta stigum (vann seks talv og leikti fýra javnleikir). Honum næstir komu havnardreingirnir Rógvi Mortensen og Helgi Dam Ziska við hálvum sætta stigum hvør.

Suðringurin Sjúrður Thorsteinsson, sum bleiv nr. 2 í unglingabólkinum í FM á páskum, blandaði seg ongantíð av álvara í toppin. Hansara mongu javnleikir forðaði hesum.

Klaksvíksdrongurin Rógvi Dragaberg hevði eina fína kapping við fýra stigum, meðan unga gentan Herborg Hansen úr Klaksvík endaði aftast við heiðurligum tveimum stigum. Hon vann eitt nú á Rógva og leikti javnt móti Sjúrði, og tað eru tvey góð prógv um hennara talent.

Rani vinnur sær nógv góð ratingstig, umframt 1500 krónur í virðisløn.

## Talvið hesa vikuna

**Hans Kr. Simonsen (2240) - IM Kim Pilgaard (2459)**

2nd Klaksvík International

**1.Rif3 Rif6 2.g3 d5 3.Bg2 Bf5 4.0-0 e6 5.d3 h6 6.Ribd2 Be7 7.c4 c6 8.b3 0-0 9.Bb2** (Hans Kristian dámar væl hesa uppstilling, telvar sum oftast á hendan hátt) **9...a5 10.Re1 Bh7 11.a3 Ria6 12.Fc1 Rc8 13.Rie5 Fb6 14.Fc3 Rfd8 15.e3 Bf8 16.Rac1 Ric5 17.Ba1 Fa6 18.b4 b5 19.Red1 Ria4 20.Fb3 axb4 21.axb4 Rib6** (21...c5! er ein góður gjøgnumbrotsleikur hjá svørtum) **22.Bd4 bxc4 23.dxc4 Ribd7 24.b5!** (Hans K. skapar sær eina frífinnu og økir harvið trýstið) **24...cxb5 25.cxb5 Fb7 26.Ric6 Re8 27.Fb2 Ra8 28.Ric4!** (Næsti riddarin kemur við í leikin) **28...Reb8?** (Helst ikki tann besti leikurin, Ric5 sær betri út. 28...dxc4 bleiv svarað við Rie7+ og síðani Bxb7) **29.Rixb8 Fxb8 30.Rie5 Ba3 31.Rixd7 Rixd7 32.Fc3 Bxc1 33.Rxc1 e5 34.Fc6! exd4 35.Fxd7 dxe3 36.Bxd5 exf2+ 37.Kxf2 Fb6+ 38.Kg2 Rf8**



**Støðmynd eftir 38...Rf8**

**39.Fxf7+!!** Flott endastøða. Mát verður eftir Rxf7 Rc8+ **1-0**



## LEYST STARV

Kassafólk

Søkt verður eftir kassafólki til keypssamtøkuna í Hoyvík at byrja beinanvegin. Arbeiðstíðin er 27 tímar um vikuna (seinnapartar).

Áhugað kunnu senda umsókn til

**Føroya Keypssamtøku**
**188 Hoyvík**
**Boks 349**

Umsóknin skal vera okkum í hendi seinast 18. oktober 2003. Nærri fæst at vita á tel 314149. Spyr eftir Bent ella Róa

## Til sølu

CATEPILLAR 3512 DITA 1200 Omdr. 1300 HK
Koyrt ca 21.000 tímar (4 ár).
Plátukølari, saltvatnspumpa á motori.
Gear: Pay Brinck PB-454 + frantgear
útveksling 5,4:1
Seriu nr. 401.0
Árgang 1987

Propeanlæg:
Hundested: CP 11.
3 bløð skrúva
Diametur: 2400 m/m
Dysa: 2400 m/m
Árgang 1988
Bossrør við stævnrør (totalrenoveraður 2002)

Motorurin og tilhoyr er sum nýtt og bleiv útskiftur vegna ísetan av størri motori. Motorurin er klárur at avheinta í Thyberøn.

Prísur alt samlað uttan MVG 1.000.000 kr

vinarligast ring
**0045 20963450 ella 532386 332386**

## Grót fæst

við at koma eftir tí.

**Tlf. 216600 ella 215609**

## Havnar Telvingarfelag

Barnatelving er hvønn mikudag í talvhúsinum.

Børn upp til 4. flokk frá kl. 16-18.
Børn í 5. flokki og upp til 10. flokk frá kl. 18-20.

**Havnar Telvingarfelag**

**Frítíðarheimið í Skrivaragøtu søkir**

## avloysara fyri pedagog

**í farloyvi frá 1. november 2003 til 31. oktober 2004**

at arbeiða 40 um vikuna frá 1. nov., ella eftir nærri avtalu. Talan er um skiftandi arbeiðstíðir og í vikuskiftum.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Frítíðarheimið er ein samdøgusstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.

Endamálið við arbeiðinum er m.a. at skapa tryggar karmar hjá brúkarnum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum hevur áhuga fyri teir einstøku bólkarnar/brúkarnar.
Umráðandi er, at tann sum verður settur kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran ella varaleiðaran, tlf. 313353/213353, millum kl. 8 og 16.

Umsóknarfreistin er 28. okt 2003 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m., stílast til:

**Stýrið fyri**
**Frítíðarheimið Skrivaragøtu 5**
100 Tórshavn

## Til sølu
## Brúktur Fiat Stilo



**Fiat Stilo 1,6 Dynamic**

Bilurin er frá aug. 2002, er sum nýggjur og hevur einans koyrt 9.800 km.
Bilurin hevur nógva eykaútgerð so sum:
VDC/EPS "antispinn"
Fartpilot
Aircondition
1 sett av 17" Alu felgum við summar dekkum
1 sett av 15" Alu felgum við vetrar dekkum
**Nývirði við eykaútgerð kr. 222.000**
**Nú til sølu fyri einans kr. 169.000**
**Tlf. 311778, eftir kl. 18**

YERTSHÙSİÐ

Vertshúsið er ídag
**HOTTASTA**
staðið í Tórshavn

...og verður sera nógv nýtt til veitslur, føðingardagar, polterabend, bindiklubbar osfr.

HESTPRENT · TEL. 314 555

**Okkara sámuligu prísir,**

...listin hjá Trónda Paturssyni, tónleikur, hugni, **Restorffs** genturnar og so sjálvandi **Restorffs** framleiðslurnar tryggja eitt...

**væl eydnað kvøld.**

Vit eru næstan full bookaði til
**JÓLABORÐHALDINI**

...men enn eru høli tøk, so tað er at gera skjótt av um tit kundu hugsað tykkum at hildið tykkara **Jólaborðhald** á Vertshúsinum.

**Ringið og tosið við Anniku**

...um tilboð, arrangementir osfr.

YERTSHÙSİÐ
Annika · tlf. 51 48 47

**Okkara ambitión er**
at gera Vertshúsið til besta
**veitslustaðið í Tórshavn**

EINGI ER OKKUM ÓFØRT!

YERTSHÙSİÐ
hjá Restorffs · tel 31 48 48

## Fundur um Vága Floghavn

Almennur fundur um flogvallarviðurskifti verður í bygdaskúlanum í Miðvági mikudagin 15. oktober kl. 19.30

Umboð fyri Vága Floghavn og stóru politisku flokkarnar luttaka.
Øll eru vælkomin.

**Vága Sambandsfelag**